gult14 cyan14 magenta14 svart14

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

Frítíðaravloysarar

Ellis- og Umlættingarheimið hjá Tórshavnar kommunu søkir við hesum eftir frítíðaravloysarum fyri sjúkrasystar, sosial- og sunheitsassistentar og hjálparfólki.

Søkt verður eisini eftir einum fólki til vaskaríið og einum fólki til køkin.

Arbeiðið
umfatar alt vanligt arbeiði á heiminum.

Arbeiðið er skipað í vaktum.

Løn
sambært galdandi sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meir fæst at vita
um starvið við at venda sær til Sólgerð Djurhuus, fyristøðukvinnu, tlf. 317339.

Umsóknir
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 22. apríl 2001. Viðmerk á umsóknina "Frítíðaravloysari"

S N A R S K I V A N

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

Húsavørður

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir húsavørði til býlingshúsini.

Arbeiðsuppgávur
Umsøkjarin kemur m.a. at arbeiða við at:
- røkja bygningarnar og økið uttanum
- gera smærri umvælingar
- syrgja fyri at el, vatn, hiti og santitetsviðurskiftini eru í lagi
- røkja ventilatiónina
- syrgja fyri at brunaviðurskiftini eru í lagi

Førleikakrøv
Umsøkjarin skal hava handverkaraútbúgving sum timburmaður ella líknandi, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevnir.

Umsøkjarin skal á skeið í skipaðum viðlíkahaldi av bygningum.

Setanarviðurskifti
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett 1. mai ella skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Landsfelag Handverkaranna.

Meira fæst at vita
um starvið við at venda sær til Eivind Danielsen, byggifrøðing, tlf. 31 51 60.

Umsóknir
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 23. apríl 2001. Viðmerk á umsóknina "Húsavørður".

Húsaumsitingin hjá kommununi umsitur umleið 100 bygningar, harav eru 9 býlingshús. Tann, ið settur verður, kemur at røkja 3 býlingshús.

S N A R S K I V A N

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

Leiðari

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir leiðara, 40 tímar um vikuna, til nýggja Dagstovnin á Fløtum, sum eftir ætlan letur upp í august mánað 2001.

Stovnurin er settur saman av fýra húsum: tveir barnagarðsbólkar við 20 í hvørjum, ein smábarnabólkur við 20 børnum og ein bólkur við 10 til 12 børnum, ið hava serligan tørv.

Vit bjóða
eitt áhugavert starv har tú fært møguleika fyri at seta tín dám á stovnin. Keypa innbýgv og leiku. Seta starvsfólk og annars vera við í øllum tí, sum skal til fyri at stovnurin skal virka eftir ætlan. Møguleiki er fyri ráðgeving og eftirútbúgving.

Vit ynskja
at umsøkjarin
- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir (er fyrimunur)
- kann arbeiða sjálvstøðugt, og taka avgerðir
- hevur hugsjónir, tá ið tað snýr seg um virksemið í einum barnagarði, sum eisini hýsir børnum við serligum tørvi
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag merktan av virðing fyri, foreldrum og starvsfeløgum
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- duga væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur teldukunnleika

Lønarviðurskifti
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

Meira fæst at vita
um starvið við at venda sær til Katrin Petersen, samskipara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 315160.

Umsóknir
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. mai 2001. Viðmerk á umsóknina "Leiðari"

S N A R S K I V A N

Til limirnar í Føroya Sjúkrahjálparafelag

Ársa›alfundur felagsins ver›ur hildin t‡sdagin 24.04.2001 kl. 10.00 á Hotel Hafnia.

Skrá: sambært lógum felagsins.
lógarbroyting

Føroya Sjúkrahjálparafelag

Sernámsdepilin

Vegna trygdarumvælingar ver›ur Sernámsdepilin stongdur frá mánadegi 9. apríl til og vi› t‡sdagin 17. apríl 2001.

Opi› ver›ur sum vanligt mikudagin 18. apríl 2001.

Lei›slan

Hondlesing í Tórshavn

í døgunum 26. mai-4. juni

Hondlesarin Marita Nielsen er í Føroyum. Lesir tína hond – fortí›, nútí› og framtí› – styrki og veikleikar. Ein annalei›is máti at síggja teg sjálvan.

Ring og bi› um tí› á
tlf. 0045 39664880 eftir kl. 16.00.

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

veitst tú ikki tað? Sosialurin

gult15 cyan15 magenta15 svart15

Vikuskifti

Nr. 69 • leygardagur • 7. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Jógvan Arge:
Drúgvasti leikarin á landsli›num
sí›urnar 20-21

2. páskakvøld ver›ur leikurin Seymistovan at síggja á palli í Bygdarhúsinum á Strondum. Talan er um leik, i› eisini inniheldur sang. Ung og eldri teljast millum leikararnar og elsti leikarin er á palli fyri fyrstu fer›, hóast farin um tey seksti

Seymistovan á pall á Strondum



Leikurin, Seymistovan, sum strandingar frums‡na anna› páskakvøld, sn‡r seg um seks kvinnur á eini seymistovu. Ein dagin seta tær sær fyri at leggja ni›ur arbei›i›. Ísta›in halda tær eitt slag av veitslu og siga har sínar søgur

SJÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen

Bygdarhúsi› á Strondum ver›ur 2. páskakvøld karmur um framførslu av leikinum Seymistovan. Strandingar fara á pall, men leikarar eru eisini av Skála, úr Skálabotni og Hvalvík.

Leikurin hevur á›ur veri› á føroyskum palli. Í sjeytiárunum leikti Havnar Sjónleikarfelag leikin, i› upprunaliga er íslendskur.

Fleiri søgur

Ria Tórgar› hevur leikstjórna›, nú strandingar hava sett sær fyri at seta Seymistovuna á pall. Hon sigur, at talan er um krevjandi leik. Nógv ung og óroynd teljast millum leikararnar, og øll hava nógv at gera alla tí›ina. Hetta, hóast níggju leikarar eru vi› í Seymistovunu.

Leikurin sn‡r seg um seks kvinnur á eini seymistovu. Ein dag seta tær sær fyri at leggja ni›ur arbei›i›. Ísta›in halda tær eitt slag av veitslu og siga har sínar søgur. Sostatt er talan um søgugongd vi› nógvum søgum í høvu›ssøguni.

Torført er at ey›merkja leikslagi›. Talan er um almennan leik.

Sangur og tónleikur eru partur av leikinum. Ásbjørn Berthelsen hevur tiki› sær av tónleikinum. Hevur lagt til rætis og umyrkt. Hóast leikurin á›ur hevur veri› á føroyskum palli, so hevur veri› arbeitt vi› málinum, fyri at fáa máli› meira nútímans.

Seksti ár og byrjanarleikari

Ria Tórgar› fegnast um, at enn glógvar, tá talan er um leik uttan fyri Havnina. Hon vónar, at nú Tjó›pallur er á veg í høvu›ssta›num, ver›ur gjørligt at menna skipanina vi› at senda leikstjórar kring landi› og at fáa hetta meira sto›ugt.

Seinnu mongu árini hevur veri› vanligt at senda leikstjórar út til áhugaleikarar, i› venja leik. Ta› er MáF, Meginfelag Áhugaleikara Føroya, i› tekur sær av hesum.

Ria Tórgar› fegnast um, at strandingar nú seta leik upp. Vi› áhugaleiki á bygd er ofta soleis, at eitt tí›arskei› er lív í, men so kólnar aftur.

Ávísir persónar dríva verki›, felagi›, fella sí›ani frá, men koma kanska aftur, ella onnur koma ísta›in, metir Ria.

Ria fegnast um, at fleiri ung eru millum leikararnar á Strondum. Fleiri eru á palli fyri fyrstu fer›. Eisini elsti leikarin, i› er meira enn seksti ár, stendur á palli fyri fyrstu fer›.

Ásko›arar kunnu vitja innar í Seymi-stovuna 2. páskakvøld, tá frums‡ning ver›ur í Bygdarhúsinum á Strondum.